Álit

í

løgtingsmáli nr. 108/2020: Uppskot til løgtingslóg um at byggja umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur lagt málið fram 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð 10. mars 2021 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 15., 19. og 23. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen, saman við Landsverki og Sjóvinnustýrinum.

Ein samd nevnd vísir á, at endamálið við uppskotinum er at fáa til vegar nýggja materiella lógarheimild samsvarandi játtanarskipan landsins til at halda byggiútreiðslur í sambandi við bygging av nýggjum umsitingarbygningi til Sjóvinnustýrið upp í 26,3 mió. kr. og harvið fáa hølisviðurskiftini hjá Sjóvinnustýrinum í fastar karmar.

Ætlanin er at byggja ein bygning upp á slakar 800 fermetrar. Bygningurin verður bygdur á matr. nr. 319a í Vága kommunu. Grundøkið er 1.480 fermetrar til støddar

Verkætlanin hevur verið í útboð sum heildarenterprisa, t.e., at tann sum vinnur útboðið, teknar, projekterar og byggir. Landsverk hevur í samstarvi við Sjóvinnustýrið gjørt byggiskránna.

Tilboðini komu inn til Landsverk síðst í mars 2021. Í útbjóðingartilfarinum varð byggikostnaðurin fyri bygningin mettur til 20 mió. kr. og afturat hesum vórðu roknaðar góðar 6 mió. til ymiskar meirútreiðslur. Tilboðið, sum á bestan hátt leyk treytirnar, ið vóru settar í útbjóðingartilfarinum, er á 23.779.651 kr.

Við støði í kostnaðinum í tilboðnum á 23.779.651 kr. verða 6.429.789 kr. roknaðar afturat, íroknað kostnað í sambandi við fyrireiking av útboðnum, til tess at leggja upp fyri ávísum óvissum, t.d. meir-/minni veitingar, eyka avtalur og lønar- og prísvøkstur, fakeftirlit og innanhýsis ráðgeving og leiðsla v.m. hjá Landsverk, umframt samsýning til tilboðsgevarar. Nakrar útreiðslur, sum eru í teimum 6.429.789 kr., eru goldnar í 2018 (56.500 kr.) og í 2019 (393.849 kr.) Hesar útreiðslur skulu dragast frá karminum í verklagslógini, og verður samlaði fíggingartørvurin tá 30.209.440 kr. frádrigið tær 450.349 kr., sum gevur 29.759.091 kr.

Í rundum tølum hevur landsstýrismaðurin tí biðið nevndina um, at karmurin í § 1, stk. 2 hækkar við 3,7 mió. kr., úr 26,3 mió. kr. upp í 30 mió. kr. Hesum tekur nevndin undir við og setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1, stk. 2 verður “26,3 mió. kr.” broytt til: “30,0 mió. kr.”.

Nevndin fegnast um, at málið nú er komið hartil, at landsstýrismaðurin fær ta materiellu heimildina til at halda byggiútreiðslurnar í sambandi við bygging av nýggjum umsitingarbygningi til Sjóvinnustýrið – ein bygningur, sum stórur tørvur er á at fáa bygdan.

Ein samd nevnd tekur við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 23. apríl 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Jógvan Skorheim	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	